## DAGSINS MEINING

# Krígsøsing

Í hesum døgum verður dúgliga sligið á krígstrummurnar og leiðin tykist ósvitandi at bera móti kríggj millum USA /Bretland og Iraq. Orsøkirnar sigast vera, at Iraq hevur hópoyðingarvápn, og at Saddam Hussein kúgar sítt egna fólk. Eisini verður hann lagdur undir at stuðla terrorismu og teimum, sum gjørdu seg inn á USA 11. september í fjør.

At Saddam Hussein er ein ráður og harðrendur einaræðisharri, ið kúgar sítt egna fólk er als eingin ivi um, at hann hevur byrjað tvey kríggj er alkunnugt, og er hann tískil ikki heimsins mest álítandi statsleiðari, men er hann førur fyri at hótta vesturheimin ella heimsfriðin? Tað er ein stórur spurningur, og var hann smettin betri, tá hann var i samgongu við USA? Tað er jú ikki stórt meira enn 10 ár síðan, at Saddam var kelivætti vesturheimsins í Miðeystri. Hann var í kríggj við erkafíggindan, ið tá var Iran. Hann varð undirdíktur í pengum og vápnahjálp. Men so gjørdi hann tað dáraverk at herseta Kuwait, ið var uppaftur betri sameindi hjá USA, enn Saddam hevði verið, og so fall hamarin. Restina av søguni kenna vit. Spuringurin er bert, um trupulleikarnir í Miðeystri verða loystir við at lopið verður á Iraq. Vit ivast. Eitt álop á Iraq fer at loypa ólag á alt Miðeystur. Harnæst fer tað at seta ilt millum kristna og muslimska heimin og at gera skilnaðin millum hesar uppaftur størri. At fara í kríggj er altíð ein sera álvarsom avgerð – tað kann seta alt Miðeystur í brand. Størsti trupulleikin í Miðeystri er ikki Iraq, men óloysta stríðið millum Ísrael og palestinensar. Fyrr enn hetta stríð er av, verður eingin friður, uttan mun til hvat USA annars ger við Iraq.

USA hevur sum heimsins sterkasta land stóra ábyrgd og skyldu mótvegis heiminum. USA kann ikki loyva sær at loysa uttanríkis- og trygdarpolitiskar spurningar bert út frá sínum egnu áhugamálum og við hermegi. Soleiðis sum gongdin hevur verið eru alt fleiri, ið eru farin at ivast, um Bush er nóg búgvin at leiða eitt so stórt og sterkt land sum USA. Málbrúk og atburður hansara týðir ikki uppá búnaðskap og fatan av heiminum, sum hann veruliga er samansettur, men heldur sum Bush og hansara ráðgevar vilja síggja hann. Ráðgevarnir eru frá faðirsins tíð. Teir tykjast ikki at kunna liva uttan fíggindar, og tí freistast man at hugsa, at ein orsøk til krígsøsingina eru vaksandi heimligu trupulleikarnir. Tað gongur av skriðuni við búskapinum, prísirnir falla í keypsskálunum og miðskeiðisval stendur fyri durum. Veljarakanningarnar eru ikki bjartar fyri Bush og flokk hansara, tí ræður um at avleiða huga veljarans frá trupulleikunum á heimavølli. Tí ber hann seg at sum ein cowboy í einum vánaligum westernfilmi, sum Al Gore tók til. Heldur enn at elva til krígsøsing áttu USA og Bretland at stuðla ST í vápnaeftirlitsloysnini. Hon stendur og fellur við, at hesi stórveldi stuðla hesi av fullum huga. Harnæst átti USA av fullum huga at farið inn í friðartilgongdina í Palæstina. Einki annað land megnar at skapa frið uttan USA. Clinton var komin væl á leið við eini friðarætlæn, tá Bush kom til valdið. Bush átti at tikið henda trupulleika í álvara. Við friði millum Ísrael og palæstinensar hevði friður fallið yvir Miðeystur og Saddam og aðrir einaræðisharrar høvdu hvorvið so at siga av sær sjálvum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skrásett parlag?

**Ingi Kirke**

Hatur: Sat ein dagin og las í sosialinum. Og har vóru minst 3. greinar um samkynd, ella sum í innihaldinum komu inn á hetta evni. Og tað sum eg fekk burturúr hesum greinum var, at trúgvandi, sum fordøma henda livimáta, tey »hata« tey, sum liva á henda hátt.

**Trúgvandi hatur**
Eg vil tí hervið siga, at ein trúgvandi hatar ikki menniskju! Og um hann hatar menniskju, so hevur hann líka stórar, um ikki størri, trupulleikar yvir fyri Gudi, enn tey sum eru samkynd!

**Meira hatur**
Orsøkin til at trúgvandi menniskju skriva um samkynd og teirra livimáta er, at tey elska! Tey elska sín næsta. Og tað er hesin kærleikin, sum fær tey at skriva. Tí kærleikin vil ikki, at nakar skal fortapast!

Trúgvandi menniskju eru av tí sannføring, at livimátin hjá samkyndum er skeivur. Og tey, sum so liva, fara fortapt. Og tí vil hesin kærleikin ávara hesi menniskju móti fortapilsinum.

Um so var, at trúgvandi hataðu samkynd menniskju, so var eingin orsøk til at ávara ella at siga, at tað er skeivt at liva upp á henda mátan. Men nú elska vit, og tað er tí vit ávara!

**A og B**
Samkyndur livimáti er skeivur sambart Guds Orði!

Og so lesur ein, at kirkjan skal vælsigna samkynd eins væl og hon signar øll onnur. Og eisini lesur ein, at samfelagið er demokratist, bla bla bla… tað er ikki átrúnarligt. Osf.

Men alt hetta er at fara skeivur! Kirkjan kann signa ein og hvønn. Men um Gud ikki er við, hvat nyttar tá signingin? Er kirkjan ikki tænari Guds? Hví vilja menniskju hava signing kirkjunnar, tá tey ikki vilja vita av gudsótta?

Og at taka átrúnaðin burtur úr tí føroyska samfelagnum, tað veit ein og hvør, at tað er vónleyst! Hetta land hevur bygt á Gud og Bíbliuna gjøgnum mong 100 ár! Vit kalla okkum *enn* fyri eina kristna tjóð!

Og so var eitt aftart. Tað var Høgni Hoydal, sum skrivaði, at lógin um skrásett parlag var bara til, fyri at tryggja teimum somu rættindi, sum øll onnur í samfelagnum, tá tað snýr seg um arv v.m.

Men vit vita øll, at aftan á A, kemur B! Og vit vita eisini øll, at um tú fyrst gevur einum lítlafingur, so tekur hann allan armin fyrr ella seinni! Og menniskjan hevur ein ótúligan hug til, at fara longur og longur út í synd!

**Gud, hvør er tað?**
Men veruleikin er tann, at fleiri og fleiri føroyingar gerast gudloysingar! Vit vilja ikki hava nakran Gud! Vit vilja vera »frí« menniskju, sum eru bundin í synd!

# Sparingar á Landssjúkrahúsinum - eykaútreiðslur fyri samfelagið

**Bárður Nielsen**
*Løgtingsmaður*



Nú árið er farið at líða, skal tað aftur sparast á Landssjúkrahúsinum, tí at játtanin ikki heldur. Leiðslan hevur meldað út, at hetta kemur at merkjast fyri sjúklingarnar við tað, at virksemið verður skert, og tað merkir, at færri sjúklingar fara at verða viðgjørdir og at harvið verða bíðilistarnir enn longri.

Fyri samfelagið merkir hetta, at sjúk fólk, ið kundu fingið viðgerð og farið aftur á arbeiðsmarknaðin, ístaðin verða sjúkrameldað longri enn neyðugt og hervið økjast útreiðslurnar hjá almannastovuni til dagpening. Orsakað av sparingum eru nakrar deildir stongdar partar av árinum og her eru dømir um, at viðgerðir eru útsettar, ið viðføra, at sjúklingar ganga sjúkrameldaðir fleiri mánaðar longri enn neyðugt.

Hetta er tað, vit í dag hava at bjóða okkara borgarum, tí at játtanin hjá sjúkrahúsinum skal haldast, men tað at vit brúka peningin til sjúkradagpening ístaðin, verður tað góðtikið.

Men álvaratos, um sjúklingarnir ikki fáa neyðugu viðgerðina nú, so koma teir aftur seinni, eftir at hava gingið sjúkir óneyðuga leingi, so her má sigast, at fyri samfelagið verður spart eftir reyv.

Vit mugu finna eina virðiliga loysn fyri allar partar, tí hetta er ikki tað, vit kunnu bjóða borgarunum í einum vælferðasamfelag, ið vit vilja verða ein partur av.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Skótahjálpin 2002



**Hvørt ár ganga skótar runt til hús í Føroyum og bjóða seg til at gera eitt hvørt fyri fólk, sum tey so fáa ein samsýning afturfyri. Peningurin, sum kemur inn frá Skótahjálpini fer til góðgerandi endamál**

SKÓTAHJÁLP
*Solby A. Eliasen*

Skótahjálpin í ár byrjaði seinasta leygardag og endar nú leygardagin. Skótarnir ganga runt og bjóða seg til at hjálpa fólki við einum og hvørjum. Tað kann vera alt frá at rudda tún til at gera ørindir.

Skótarnir hava eitt kort við sær, tá tey ganga runt, sum fólk kunnu skriva á, hvat skótin hevur gjørt og samsýningina.

Tað er nevndin fyri Skótahjálpini, sum avger, hvar peningurin skal fara. Í henni sita tvey umboð fyri KFUM skótarnar, tvey fyri KFUK skótarnar, tvey fyri Skótasamskipan Føroya og tvey umboð fyri Frelsens Hær.

Vanligt er, at peningurin, sum kemur inn verður býttur sundur í tvey. Annar parturin fer til eina føroyska verkætlan, og hin fer til eina útlendska verkætlan.

Í ár verður tað leikahugskotsavnið á Sernámsdeplinum, sum fær tann føroyska partin, meðan hin parturin fer til eitt dagsentur fyri gøtubørn í Kiev í Ukraina.

Símun Michael Sørensen frá nevndini fyri Skótahjálpini sigur, at í fjør komu 110.000 krónur inn. Tá fóru 40.000 krónur til føroyskar ljóðbøkur, og aðrar 40.000 krónur til eitt barnaheim hjá Frelsens Hær. Restin varð so sett í grunn.

Hann sigur eisini, at til ta útlendsku verkætlanina royna tey at leggja seg eftir, at tað er ein føroyskur móttakari, sum syrgir fyri, at peningurin kemur upp á pláss.

- Tað gera vit, tí tað kann vera so skjótt, at um vit lata peningin fara til eitt hvørt útlendskt við ókendum móttakara, at peningurin so bert endar í eini stórari pulju. Og tað vilja vit ikki, sigur Símun Michael Sørensen.

Í Kiev hava tey so fingið fatur á eini kvinnu, sum eitur Jórun Fonsdal. Hon er send til Kiev at arbeiða av Heimamissiónini.

Hann dugir ikki at siga heilt greitt, hvussu Skótahjálpin verður móttikin í dag. Men peningurin talar kanska fyri seg. Hann heldur tó, at boðskapurin um hjálp ikki verður nóg væl seldur.

- Um hann hevði verið tað, so kundi roknast við, at undirtøkan fyri hjálpini hevði verið uppaftur betri, heldur Símin Michael Sørensen.

# Tvær barnastjørnur í Mentunarhúsinum í Fuglafirði

**Leygarkvøldið klokkan átta verður konsert við Brandi Enni og íslendsku Johanne Gúðrum í mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tey fara at framføra sangir hvør í sínum lagi umframt, at tey eisini fara at syngja saman**

KONSERT
*Solby A. Eliasen*

Johanne Gúðrum, sum er tólv ára gomul, er líka kend í Íslandi, sum Brandur er í Føroyum. Hon hevur givið fleiri fløgur út í Íslandi.

Brandur hevur verið í Íslandi fleiri ferðir og nú fáa føroyingar høvi til at síggja og hoyra hann og Johanne á palli í Fuglafirði leygarkvøldið.



# Loppumarknað ístaðin fyri Skótahjálp

**Teir eldru gulu skótarnir í Klaksvík skipa fyri loppumarknað leygardagin í sambandi við, at Skótahjálpin endar tann dagin**

SKÓTAHJÁLP
*Solby A. Eliasen*

Gunhild Dahl Niclasen er ein av rovarunum hjá Skótaliðinum Nólsoyar Páls, sum skipar fyri loppumarknaðinum. Hon sigur, at tey hava nú í nøkur ár skipað fyri tiltøkum heldur enn at ganga hús úr húsi.

- Vit tíma ikki so væl at ganga runt longur, tað kunnu tey yngru heldur gera. So hava vit valt heldur at skipa fyri onkrum tiltaki. Vit hava vanliga havt køkutombola og so bilvask. Men í ár verður tað so loppumarknaður, greiðir hon frá.

Hon sigur, at tað sum heild hevur verið tikið væl undir við teirra tiltøkum undanfarin ár. Hóast veðrið so avgjørt ikki altíð hevur verið við teimum.

- Tað eina árið noyddust vit at avlýsa, tí tað var stormur úti, so hugsingur var ikki um at vaska nakran bil, sigur Gunhild.

Men í ár verður veðrið so ikki nakar trupulleiki, tí loppumarknaðurin verður inni í skótahúsinum, Uppistova, leygardagin. Tað verða einans lutir og ikki klæðir á loppumarknaðinum, og Gunhild sigur, at um fólk hava lutir at lata, so kunnu tey koma í Uppistovu við teimum fríggjakvøldið millum klokkan 19 og 21.

Loppumarknaðurin verður frá 10 til 14 leygardagin.

# Dagsentur fyri gøtubørn í Kiev

**Tann útlendska verkætlanin, sum fær pening frá Skótahjálpini í ár, er eitt dagsentur fyri gøtubørn í Kiev**

SKÓTAHJÁLP
*Solby A. Eliasen*

Sosialurin hevur tosað við Jóannes Fonsdal úr Vestmanna. Dóttir hansara Jórun Fonsdal er stødd í Kiev.

Hann greiðir frá, at tað er eitt sentur har millum fýra og seks børn koma antin hvønn ella annanhvønn dag.

Hetta eru børn hvørs foreldur av ymiskum orsøkum ikki hava umstøður til at hava tey heima, so tey fara kanska bert til hús at sova og ganga so og reika í gøtunum allan dagin. Ofta eru foreldrini misnýtarar av ymsum slag, og ofta er tað talan um einligar mammur eisini, sum ikki hava umstøður til at hava teirra barn heima um dagin.

Jóannes veit at siga frá dóttrini, at í Kiev er tað sanniliga ikki sum her í Føroyum. Tað vil siga, at um eitt barn ikki er í skúla, so eru tað ongir myndugleikar, sum taka sær av tí. Og tískil kann eitt barn saktans ganga og mala og ongantíð koma í skúla.

Á dagsentrinum royna tey at geva børnunum ein hugnaligan og so heimligan dag sum møguligt. Tað eru ofta tey somu børnini, sum koma aftur hvønn dag.

Har fáa tey mat, tey hava møguleika til at fara í bað og at fáa klæðini vaskaði. Tað verður eisini spælt við børnini á sentrinum.

Sjálvandi verður tað eisini roynt at fáa børnini í skúla.

Jóannes sigur, at eftir sum hann skilir á dóttrini, so eru ongir myndugleikar, sum hava eyguni eftir børnunum, og tí ganga tey og mala fyri vág og vind. Hann er ikki greiður yvir, um tað er undirvísingarskylda í Ukraina, men eitt er vist, og tað er, at um eitt barn dettur niður ímillum og onga skúlagongd fær, so er ongin myndugleiki, sum tekur sær av tí.

Jórun Fonsdal er send út av Heimamissiónini til dagsentrið í Kiev. Umframt hana er eisini ein annar har á dagsentrinum. Hann er ættaður úr Kirgistan. Tey lesa Bíbliusøgur við børnunum akkurát líka sum tað verður gjørt her í Føroyum. Tað er líka sum tann andaliga síðan av hesum arbeiðinum hjá teimum í Kiev.

# Leikahugskotsavnið í Sernámsdeplinum

**Tann føroyska verkætlanin, sum fær pengar frá Skótahjálpini, er leikahugskotsavnið hjá Sernámsdeplinum**

SKÓTAHJÁLP
*Solby A. Eliasen*

Jórun Ellefsen, serlærari á Sernámsdeplinum sigur, at leikahugskotsavnið er eitt stað, har møguleiki er at læna leikur til menningartarnaði børn og børn við serligum tørvi.

Foreldur, stuðlar og onnur fakfólk kunnu koma til depilin og síggja og royna ymsar leikur, fyri at vita, um tað er tað rætta til teirra barn.

Eisini hava tey á Sernámsdeplinum roynt at savna lesi tilfar saman, sum tey so kunnu vísa á. Hetta tilfar er alt eitthvørt, sum hevur við sernámsøkið at gera.

Tað eru tvær, sum taka sær av hesum. Jórun Ellefsen, serlærari og Augusta Mikkelsen, fysioterapeutur.

Jórun sigur, at leikahugskotsavnið snýr seg í stuttum um hjálpiamboð til spæl ella skriving og annað tílíkt. Eisini hava tey tekniska útgerð. Til dømis um tað er so at eitt barn ikki kann nýta eina teldu uttan eina ávísa kontakt, so hevur leikahugskotsavnið eisini tað. Men tað verður ikki lænt út, tí tað er sera kostnaðarmikil útgerð. Men her hava foreldur og onnur møguleika til at royna tað, so kunna tey finna útav, um tað er tað rætta.